okkum tiðina við.

Fyrsti steðgur var í Viborg, har eitt kafeteria var, sum eisini seldi vikubløð. Forkunnugt, sum tað var at fáa nýggj vikubløð ein leygardag, ístaðin mánadag ella týsdag, — ja, so var neyvan eitt Familjejournal eftir, tá vit fóru avstað.

Í Århus var enn ein drúgv bíðitíð til bussurin kom fram, og bussførarin og ferðaleiðarin komu síðani umborð í Suðurjútlandi, og ferðin kundi at enda byrja.

»Non-stop ferð«

Á ferðamannamálinum eitur ein slík ferð sum okkara »Non stop ferð«. Tað merkir, at bussurin koyrir beina leið til landið, sum fólk skula vitja. Áður varð gist eina nátt í Danmark ella Týsklandi, tá fólk skuldu til Eysturríkis, men tað verður ikki gjørt longur. Ferðamannafeløgini siga, at tað er fyri at spara tíð, so fólk kunnu vera so leingi sum gjørligt, har tey ætla at vitja. Helst hevur tað eisini nakað við kostnað at gera, tí bussferðir eru sera bíligar, samanborið við tok og flogferðir.

Bussferðir verða nú eisini meira nýttar, tí ein t. d. ikki er bundin at ávísum avstaðferðum, eins og teir nýggju bussarnir eru væl innrættaðir til slíkar langferðir.

Henda bussferð varð soleiðis løgd til rættis, at vit høvdu møguleikar at gera av, hvar vit fóru, hvussu leingi og nær stundin var komin, tá vit vildu sleppa heim aftur á gistingarhúsið. Tað var ikki beinleiðis neyðugt at seta sær so nógv fyri, at ein ætlan ikki kundi broytast, og tað var gagnligt fyri ferðafólkið, sum ikki vóru nakrir ársungar á hesi ferðini.

Gjøgnum Týskland koyrdu vit fyrstu náttina við stuttum steðgum í millumbilum. Tað var ikki stórvegis, ein kann sova í bussi, men kortini høvdu ferðafólkini ikki mist mótið.

Og kortini, tá vit eftir morgunmat fyrsta dagin fóru aftur í bussin, var ov mikið fyri ein ferðamann. Hann fekk hjartatilburð, hevði ikki tolt baksið hesa náttina.

Sjúkratilburður

Birthe Jørgensen, ferðaleiðari, gjørdi stutt av. Vit komu fram við eini Nato stød, har sjúkrabilur varð tilkallaður og sjúklingurin koyrdur á sjúkrahús í Fulda í Týsklandi. Bíðað varð har í tveir tímar, meðan sjúklingurin varð kannaður, men hann slapp ikki við okkum til Tyrol. Avgjørt varð, at vit skuldu koma eftir honum á heimvegnum.

Sjálvsagt hevði henda hending við sær, at fólk gjørdust ógvuliga tigandi, men við hesum sum so mongum øðrum óvæntaðum hendingum á ferðini, so dugdu ferðafólkið ógvuliga væl at taka alt, sum tað kom.

Prátið kom sum fráleið í gongd aftur. Nógv var at tosa um, um tað vit sóu, men eisini um langommubørn, abbabørn og børn o. s. fr., so har var rættiliga nógv tilfar til at taka.

Klokkan seks á kvøldi vóru vit í Kaltenbach í Zillertal, har vit skuldu búgva á Hotel Post.

Tað var ein sonn uppliving at siggja, hvussu landslagið broyttist at kalla frá einum tíma til annan. Í Tyrol er náttúran og umhvørvið sum heild framúrskarandi vakurt og væl farið um. Fjøllini eru kløddi við trøum heilt upp á tindarnar. Aftanfyri eru Alpurnar, sum fjallaryggir í hópatali, so steyrrættir og høgir, at teir næstan nema himmalhválvið.

Í Tyrol eru øll húsini sum á vanligu fotomyndum, vit hava sæð áður. Øll eru nýmálað, við altanum, sum eru listarligir træskurðir, við blómum í hópatali. Serligt fyri húsaumhvørvið er eisini, at tey har prýða hús við listarligum málningum, sum oftast eru gudamyndir o. a., sum stavar frá katólsku trúnni, og søgu landsins.

Lóg at byggja í »Tyrolarsnið«

Í Tyrol eru fyri størsta partin tríggjar vinnugreinir. Har eru 39 pst., sum virka innan træidnað, málm og minuídnað. Umleið 22 pst virka innan jarðarbrúk og umleið 16 pst. innan handil og ferðamannavirki.

Í landspartinum har vit vitjaðu, undraðu vit okkum yvir, at húsini vóru so stór og vælhildin. Har sást ikki nakar munur, hvørt nøkur fólk vóru betur fyri enn onnur.

Ferðaleiðarin Birthe Jørgensen sigur, at fólk her fáa stuðul og skattalætta frá landinum, um tey byggja hús, sum eisini kunna nýtast til at hýsa ferðafólkum. Tað verður gjørt fyri at stimbra ferðamannavirksemið. Haraftur er tað lóg, at øll hús skulu byggjast í vælkenda »tyrolarsnið«, fyri at varðveita gamla byggisnið.

Annars sigur Birthe Jørgensen, sum er vælkend í Eysturríki, at fólk flest liva ógvuliga einfalt, og hóast lonirnar er líka stórar, sum hjá okkum, so býr húsfólkið í køkinum í gerandisdegnum, hevur eina stovu at bjóða fólki innar og annars hava tey eitt ella tvey rúm at sova í.

Vanliga myndin er tann, at húsmamman rekur hotelvirksemi, meðan maðurin hevur lítið jarðbrúk við síðuna av.

At tað hevur eydnast at fáa ferðafólk til Tyrol, sæst einamest á ferðamannatalinum. Í 1980 vitjaðu 15 mill. ferðafólk í Eysturríki.

Sermerkt fyri íbúgvarnar í Eysturríki og í Tyrol landspartinum, har vit vitjaðu, var, at fólkið var so blitt og fyrikomandi, sum ein neyvan hevur upplivað áður. Harnæst at gistingarrúmini vóru so ovurneyvt rein og hugnalig.

Seingjarklæðini vóru av gamla slagnum, fonhvít og nýstrokin. Innbúgvið alt og baðirúmini, sum boyrdu til hvørt kamar, var av nýggjasta slag.

Væl hvíld dagin eftir gekk ferðin um Brenner fjallaskarðið, sum er 1374 metrar yvir sjóarmálan, til Vipetino í Suðuritalia. Flestu innbúgvar har virka innan handil og serliga leðurvørur eru at fáa har.

Heimaftur gekk leiðin eftir kendu Europabrúgvini, sum er motorvergur, bygdur á súlum, ið standa 190 metrar uppi í fjallalandinum. Brúgvin er 820 metrar long og 190 metur spenn er millum súlurnar. Europabrúgvin varð bygd í 1963.

Føroyar og Europabrúgvin

Onkur helt ivaleyst, at tað var hættisligt soleiðis at hanga í leysari luft og bað hini syngja, fyri at gloyma óttan. Vit trivu í »Í góðum veðri . . .«, og tað gekk avbera væl. Tá ljóðaði onkunstaðni í bussinum: »Nú er lítil seiður at fáa . . .«, og Føroyar og Europabrúgvin vóru tengd saman eitt lítið bil. So fóru vit víðari fram á ferðini.

Tað er ógjørligt at siga frá allari ferðini, tí hon var

Jú, skemtiligt var í st. Johann á veitslu í tyrolarholl. Vanliga búgva tær í Havn, Tvøroyri og Klaksvík.

Ole Nielsen, bussførari og Birthe Jørgensen, ferðaleiðari. Birthe hevur virkað sum ferðaleiðari í 10 ár. Hon byrjaði hjá Tjæreborg, síðani Spies og er nú hjá Papuga fyritøkuni, har hon bert arbeiðir í summarfrítíðini. Hon er annars læknaskrivari og arbeiðir á serkønum stovni fyri psykiatriskar sjúklingar í Brørup.

Hóast gjaldoyra skifti frá okkara gjaldoyra til D-mark, lira og ÖS. shillings, so vóru ráð fyri tí. Tænararnir vóru fyrikomandi og høvdu góðar stundir at hjálpa feraðfólkunum.